# Føroyskur kalendari ferðast kring allan heimin

**- Eg veit um, at sjálvt í eini fjarskotnari bygd í Australien hava fólk sæð mín kalendara, sigur 73 ára gamli Jákup Andreas Arge, sum nú er komin við Myndakalendaranum fyri komandi árið**

KALENDARI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Summargestur:** Líka so vist sum at ferðafólkini koma higar um summarið, kemur Myndakalendarin til árið eftir út um somu tíð.

26. árið á rað hevur Jákup Andreas Arge aftur givið út ein slíkan myndakalendara fyri 2006, sum nú er at fáa til keyps kring landið.

- Mær dámar altíð best at vera í góðari tíð við hesum kalendaranum. Men í ár var eg kortini tveir mánaðir seinni enn eg plagi.

- Eg haldi, tað er gott at fáa kalendaran út um summarið, tí tá selir hann meiri, sigur 73 ára gamli Jákup Andreas Arge við Sosialin.



*- Uttan konuna, Solveig, so hevði ikki nógv komið burturúr. Hon hevur skil á roknskapinum og øllum tí, og soleiðis fá eg møguleika at hugsa bert um myndirnar og hvussu eg seti kalendaran upp, sigur Jákup Andreas Arge, sum er avmyndaður saman við konuni, Solveig*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í kalendaranum eru sjálvsagt 12 myndir úr Føroyum, harav fleiri teirra eru forvitnisligar loftmyndir, sum eru tiknar úr tyrluni hjá Atlantsflog og úr lítla flogfarinum hjá Hans Hansen, flogskipara.

## Kendur kalendari

Tað byrjaði sum ein roynd í 1980, men síðani tá er hesin myndakalendarin vorðin fast innbúgv í mongum heimum í Føroyum.

Tað eru tó ikki bert føroyingar, sum dáma henda kalendaran, tí Jákup Andreas Arge veit um, at hesir kalendarar eru at finna í hópin av heimum í mongum londum, t.d. Íslandi, USA og Russlandi.

- Eg fekk enntá at vita frá nøkrum íslendingum, at teir høvdu sæð mín kalendara í Australien. Teir vóru komnir inn í eitt heim í eini fjarskotnari bygd, og mín sann - har hekk so mín kalendari eisini.

- Ja, er tað ikki ótrúligt?, sigur hann.

Sjálvur hevur hann onga frágreiðing um, hví hansara kalendari verður so væl móttikin av fólki.

- Kanska er tað tí, at fólk kenna henda kalendaran gjøgnum fleiri ár, sigur Jákup Andreas Arge.

## Góð motivir

Tá ein ger slíkan kalendara er tað altíð ein spurningur, hvørjar myndir ein skal velja út.

Hesaferð hevur Jákup Andreas Arge lagt stóran dent á loftmyndir, har ein sær meiri niðuryvir vøkru oyggjar okkara úr flogari og tyrlu.

Hann hevur verið á fleiri túrum við tyrluni hjá Atlantsflog, eins og við flogfarinum hjá flogskiparanum, Hans Hansen. Og júst í seinna førinum heldur hann seg hava fingið mest burtur úr.

- Eg havi havt eitt headsett á høvdinum, so at eg kundi tosa við Hans um hvar flúgvast skuldi, so eg fekk tær allarbestu myndirnar. Soleiðis hava eg fingið júst tað motivið, sum eg ynskti mær, sigur hann.

Flestu myndirnar eru tiknar í fjør, meðan ein er tikin í ár. Ein av myndunum er tó um 20 ára gomul, og er tikin við fyri at vísa, hvussu nógv er broytt á Tvøroyri hesi árini.

# - Eingin heimild at syndra flokkin

**- Vit eru sannførd um, at rektarin á Studentaskúlanum í Hoydølum er farin útum sínar heimildir, við ætlan síni at niðurleggja okkara flokk. Vit eru eisini sannførd um, at rektarin ikki hevur fylgt teimum mannagongdum sum eru ásettar fyri skúlan, siga næmingarnar í flokkinum 2. A. Hesin flokkurin hevur higartil verið ein, men sum eftir summarfrítíðina helst verður býttur sundur í tríggjar flokkar. Nú hava næmingarnir kært avgerðina til mentamálaráðharran**

SKÚLAMÁL
*Snorri Brend*



*Næmingarnir í 2. A í Hoydølum er ikki enn komnir á mál í stríðnum fyri at varðveita flokkin sum ein flokk tað seinasta árið í Hoydølum. Trupult er at fáa svar frá myndugleikunum, og tí er nú ein kæra send mentamálaráðharranum*

**Hoydalar:** Fyri næmingarnar í 2. A er eingin ivi um, at alt er ikki farið nóg greitt fram í málinum, tá avgerð varð tikin um at syndra teirra flokk.

Tey siga beinleiðis, at avgerðin hjá rektaranum manglar nøktandi og kravdar grundgevingar, og at allar mannagongdir, m.a. í fyrisitingarlógini ikki eru fylgdar.

Sum eitt av kærupunktunum vísa teira á, at rektarin ikki hevur fylgt øllum ásetingum um skrivliga at boða næmingunum frá avgerðini, og at rektarin ikki hevur loyvi at flyta málsligar næmingar í ein matematiskan flokk.

- Avgerð rektarans byggir ikki á nakran hátt á atlit at næmingunum, hvørki námsfrøðiliga ella á annan hátt, men er einans grundað á, at loypa uppum harðin har hann er lægstur, sigur næmingarnir í kæru síni.

Kæran er seks A4-síður til støddar við samandrátti og við ávísingum til ein mannagongd, sum ikki heilt er í tráð við galdandi lógir fyri virksemið kring ein studentaskúla av slíkum slagi.

Tað hevur skund fyri næmingarnar at fáa øll viðurskiftini uppá pláss, í øllum førum áðrenn summarfrítíðin byrjar og áðrenn næsta skúlaár skal byrja.

Eitt annað mál, sum heldur ikki er loyst, er hvussu flokkurin skal býtast sundur. Tann spurningurin er eisini ósvaraður í skrivandi løtu.

## Ásetingar ikki fylgdar

Í teirri grundigu kæruni vísa næmingarnir at lógir og greinar innan skúlans virki, og vísa m.a. til nakrar av grundgevingunum hjá rektaranum fyri hesi loysnini - grundgevingar, sum næmingarnir ikki eru samdir í.

Teir vísa eisini til Lærararáðið, sum - eftir teirra metan - ikki hevur havt hetta málið til ummæli sum lógin ásetur. Sama støðan er, tá talan er um lærarafundin, sum heldur ikki hevur havt hesa avgerðin til ummælis, og heldur ikki Næmingaráðið við skúlan.

Út frá punktunum í kæruni og grundgevingunum í ymiskum løgtingslógum eru næmingarnir tí sannførdir um, at rektarin er farin út um sínar heimildir.

Næmingarnir eru tí sera misnøgdir við framferðina í hesum málinum, og ynskja tí svar uppá kæruna og eina lýsing av øllum málinum sum skjótast. Og hetta hevur veruliga skund, tí síðsti skúladagur í hesum skúlaárinum er beint fyri framman.

At enda í kæruni siga næmingarnir, at teir ikki enn hava tikið avgerð um at kæra manglandi innlit í skjøl v.m. í málinum, frá rektaranum og frá mentamálaráðnum. Ein slík kæra kundi verðið send til løgmann ella løgtingssins umboðsmann.

- Avgerð um hetta verður tikin so skjótt svar er komið uppá hesa kæru, men tó seinast 20. juni í ár, siga næmingarnir at enda í kæruni til Jógvan á Lakjuni.

## 900 undirskriftir

Eftir at hava gingið í sama flokki í samfull tvey ár, var avgerð nú tikin um, at 2. A í Studentaskúlanum skuld býtast sundur í tríggjar aðrar flokkar. Onkur teirra varð enntá noyddur at fara í ein matematiskan flokk.

Hetta góðtóku tey ikki, men fóru beinanvegin undir at savna inn undirskriftir, og eftir fáum døgum høvdu tey fingið um 900 undirskriftir frá lesandi og vanligum fólki móti sparingum í miðnámsskúlunum.

Tey kravdu eisini at fáa alment innlit í alt samskiftið í hesum máli, men tá vit seinast frættu frá teimum, var einki svar komið til teirra, hóast slík mál hava eina ásetta tíðarfreist. At henda ásetingin ikki varð fylgd, hevur tí fingið næmingarnar at taka enn eitt stig.

Hóast tey øll sum ein eru bundin at royndum í hesum mánaðinum, hava tey sett fram eina kæru til Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra um ætlaðu niðurleggingina. Tað er hann sum hevur ovastu ábyrgdina av undirvísingarmálum, og tí er kæran stílað til hansara.

**Hvat víðari hendir í málinum er ilt at siga. Men vit fara at fylgja málinum upp í komandi tíðum.**